


**Nr. 25** ***3. desembur 2023*** **83. árg.**

# Stjørnan

Hevur tú nakrantíð hugsað um, hvussu undurfult tað var, at teir tríggir vísmenninir fóru úr einum landi langt burturi frá Ísrael og so kortini komu til ta røttu krubbuna – í tí rætta fjósinum – í tí røttu bygdini – í tí rætta landinum nógvar hundrað kilometrar haðani?

Teir høvdu hvørki kort ella kumpass, men bara ein vegvísara – eina stóra, bjarta stjørnu, sum stóð beint uppi yvir tí staðnum, teir skuldu vitja.

Teir kendu ikki Jesus, men teir vildu fegnir koma at kenna hann, tí fylgdu teir stjørnuni. Og so vórðu teir førdir beint yvir til tað fjósið, har Jesusbarnið lá í einari krubbu.

Kanska hevur tú tað sum teir tríggir vísmenninir. Tú hevur kanska hoyrt okkurt um Jesus – hoyrt, at hann er heimsins Frelsari. Tú kennir hann ikki rættiliga, men tú vilt fegin læra hann betur at kenna – so skalt tú gera sum teir tríggir vísmenninir …

„Okkum við ein stjørna leiðir …,“ syngja vit í einum jólasálmi, og „okkum lívsins gøtu greiðir, so vit finna Jesus Krist.“

Tað vóru altso ikki bara teir tríggir vísmenninir, sum høvdu ein slíkan bjartan vegvísara til Jesusar. Eina slíka leiði-stjørnu hava vit øll somul. Í síðsta versi í sálminum „Fagur himin er at sjá“ stendur:

*„Gøtan liggur ljós og bein,*
*tí vár stjørna, bjørt og rein,*
*er Guds sannleiks orðið ríka,*
*sum man aldri, aldri svíkja,*
*lýsir heim í Faðirs høll.*“

Guds orð – tað, tú lesur í Bíbliuni, ella tað, tú hoyrir í kirkjuni ella í missiónshúsinum, er tín leiði-stjørna.

Um vísmenninir ikki høvdu fylgt stjørnuni, høvdu teir ongantíð funnið Jesus. Og bara um tú fylgir tínari stjørnu, Guds orði, kemur tú til tín Frelsara, Jesus Kristus.

*Effie Campbell* umsetti.

# Guds orð um jødarnar gongur út

Grethe Tangen Olsen ferðaðist kring alt Noregi fyri felagið „Hjálpið jødunum heim". Hon hevði ein videofilm við sær, sum vísti ta ótrúligu hendingina í 1991, tá ið 14.400 etiopiskir jødar komu til Ísrael í eitt og eitt hálvt samdøgur. Trý børn vórðu fødd á flogferðini. Í Guds orði stendur soleiðis: „Sí, eg flyti teir heim aftur úr norðursins landi og savni teir frá ytstu útryðjum jarðar. Teirra millum eru blind og lamin, burðarbúnar og føðandi konur." Jer. 31,8.

*Effie Campbell* umsetti.

# Eingil Guds varðveitti tey

*„Eru teir (einglarnir) ikki allir tænandi andar,*
*sum verða útsendir til hjálpar teirra vegna,*
*sum skulu arva frelsu?" Hebr. 1,14.*

Á einari av mínum trúboðaraferðum í Kenya vitjaði eg trúboðararnar Strubble úr Svøríki, sum hava verið 50 ár av lívi sínum í Afrika. Tá var tað, at teir søgdu mær hesa søguna:

„Tað var í Mau Mau tíðini, tá ið tjóðskaparaldan fór um Kenya, og stórir uppreistrar vóru móti hvíta manninum og teimum, sum hildu við honum. Fólk í túsundatali máttu bøta við lívi sínum á ræðuligastan hátt. Og undir hesum umstøðum var tað, at vit upplivdu, hvussu ráur heiðinskapurin er. Í langa tíð vóru vit plágað og hótt eftir lívinum. Tey skuldu hava okkum burtur frá staðnum, har vit róku trúboðaraarbeiðið. Teir áttu markirnar, søgdu teir, tí hevði medesinmaðurin biðið ilt niður yvir okkum, so tað var bara ein tíðarspurningur, nær ólukkan fór at ráma okkum.

Meðan vit livdu undir hesum umstøðum og hoyrdu um alt tað ræðuliga, sum hendi kring okkum, skiltu vit, at bønin var einasta leiðin at ganga. Vit vistu, at Harrin vildi senda einglar sínar at verja okkum móti øllum illum. Og hesa tíðina fingu vit

Guds arm at síggja á mangar mátar. Mong blivu frelst, og Gud møtti mongum.

Men so eina náttina komu teir, sum høvdu svorið seg saman ímóti okkum. Ilskuráðini vóru klár. Ognir okkara, húsini og alt skuldi brennast í grund, meðan vit á náttartíð lógu og svóvu. Men við portrið, har sum teir máttu fara inn, møttu teir einum hávaksnum skapningi, sum var mettur at vera yvir tveir metrar. Hann dró svørð úr slíðra og reiggjaði tað yvir høvdinum til reiðar at sláa, so eingin teirra vágaði sær at nærkast ognum okkara. Á henda hátt vardi Gud okkum. Seinni varð ein av ránsmonnunum frelstur, og hann segði okkum frá hesari hendingini."

Vit mugu prísa Gudi fyri umsorgan hansara og minnast, hvat ið Skriftin sigur: „Harrans eingil kring teir stendur, ið hann óttast, og hann teimum bjargar." Sálmur 34,8.

*„Samaritan"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Tíðin

Tað er løgið, sum vit menniskju meta ymiskt um tíðina. Mong gremja seg um, at tey skulu renna kapp við tíðina, meðan onnur hava tann trupulleikan at fáa „sligið tíðina í hel". – Tað eru fólk, sum eru álvarsliga herjað av „álmanakka-sjúku", tað vil siga, tey eru sett av álmanakkanum og kunnu bert rokna seg sjálvi sum ein menniskja við týdningi, tá ið álmanakkin er heilt upptikin. Tá ið vit tosa so nógv um at hava tíð ella ikki hava tíð, so kemst hetta helst av, at tað er tíðin, sum hevur okkum.

Eitt, sum er nógv frammi í fjølmiðlunum, er, tá ið onkur setur eitt ítróttarmet. Tað ljóðar, sum tað hevur alstóran týdning, tá ið eitt met verður broytt við einum 7/10 sekundi; men mitt í øllum hesum uppskrúvaða ørskapinum kunnu vit spyrja við Storm P: „Og hvat vil hann so brúka ta tíðina til?"

Tað, sum hevur størri týdning enn alt okkara prát um at hava tíð, er, at ein og hvør okkara fær sína avmáldu tíð. Og tíðin er sum ein skál, sum skal fyllast – eisini frítíðin. Uttan mun til, um vit eru burtur ella heima, so tørvar okkum kvirru inni fyri Gudi – hon er ein treyt fyri tí sanna mannalívinum. Her í Føroyum ert tú ongantíð langt burtur frá einari kirkju ella einum møtisali. Lat hesa lítlu heilsan minna teg á: „Gev tær stundir." Eisini at lurta eftir Guds orði. Tí tíðin er hansara, og

tað sannasta, sum kann sigast um okkum og tíðina, er tað, sum skrivað stendur í Sálmi 31,16: „Í hond tíni eru tíðir mínar."

*Effie Campbell* umsetti.

# Dánjal

*Morgan Kornmo*

*„Men hví sært tú flísina, sum er í eyganum á bróður tínum, men bjálkan í tínum egna eyga verður tú ikki varur við?" Luk.6,41*

Tá ið ungfólk koma út í harðskap, misbrúk og synd av ymsum slagi, verður ofta skyldað upp á heimligu umstøðurnar, vinirnar og bólkatrýst.

Dánjal í Gamla Testamenti var um 20 ára gamal, tá ið hann varð herleiddur til eitt fremmand land, har umstøðurnar vóru púra øðrvísi. Men hann læt seg ikki ávirka av tí. Hann setti sær høg mál og livdi eftir teimum. Hann læt ikki umhvørvið skaða seg. Hann var fyltur av Gudi. Tað var Frank Mangs, sum segði: „Tað var ov nógvur andi og ov lítið kjøt í Dánjali, tí kundi hann ikki gerast leyvumatur."

Tá ið Dánjal var 90 ár, profeteraði hann um endan. Tú ert ikki nóg væl kunnaður, um tú bara lesur bløðini og lurtar eftir útvarpi og sjónvarpi. Nei, vit mugu lesa tað profetiska orðið. Lesið 12. og 13. kapittul hjá Zakarja. Verðin noyðist at lesa bløðini og lurta eftir sjónvarpi at vita, hvat ið hendi í gjár. Guds fólk lesur í Bíbliuni og fær at vita, hvat ið hendir í framtíðini.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Tað er alneyðugt at hava eina visjón, ein brennandi eldhuga, fyri Guds søk, og tað er av størsta týdningi at halda visjónini livandi. *e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3. des. | **Tekstur:** | Luk. 1,26–31 + 36–45 + 56 | **Bíbliuorð:** | Luk. 1,37 |
| 10. des. | **Tekstur:** | Luk. 2,1–20 | **Bíbliuorð:** | Luk. 2,11 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 26** ***17. desembur 2023*** **83. árg.**

# Rætt hondina út

*„Og orðið varð hold og tók búgv okkara millum...“ Jóh. 1,14.*

Kirkjuliðið í einari prestbyterianskari kirkju helt gudstænastu jólaaftan, og teirra millum var ein alkoholikari, sum var um at blíva hjálptur út úr sínum trupulleikum. Navn hansara var Jim. Hetta var fyrsti jólaaftan, at hann skuldi vera einsamallur.

So kom ein ung familja og setti seg undir liðina á honum. Tá orkaði hann ikki at basa sínari sorg, og hann kendi seg noyddan at fara. Á veg út úr kirkjuni møtti hann presti, sum spurdi, hvar hann ætlaði sær. „Út at fáa mær upp í glasið,“ svaraði hann.

Prestur, sum kendi trupulleikan hjá Jim, segði: „Hatta ber ikki til. Hvar er verjin, stuðulsmaðurin, hjá tær?“

„Hann heldur frí,“ ljóðaði svarið. „Eg kom her í kvøld og hevði brúk fyri einum troystarorði, og hvat hendir? Eg komi at sita undir liðini á hasari familjuni. Um lív mítt hevði verið, sum tað átti, hevði eg sitið har við mínum kæru.“

Prestur yvirtalaði Jim at koma innaftur, og meðan hann gekk upp á prædikustólin, bað hann: „Gud, gev mær eitt troystarorð at geva Jim.“

Tá ið hann hevði bjóðað kirkjufólkinum vælkomnum, segði hann: „Eg havi ein fyrispurning. Er onkur her, sum er vinur við Bill W. – og um tú ert vinur við hann, so ivast tú ikki – so vil eg biðja tey fara inn í sakristiið.“ (Bill Wilson, betur kendur sum Bill W., er medstovnari av Anonymum Alkoholikarum). Í stundini fóru fólk á føtur runt um í kirkjuni. Tú skilir, at øll hesi fólkini høvdu verið anonymir alkoholikarar. Seinni segði prestur: „Meðan eg hevði úr at gera at prædika **um** Jesu

komu her niður á okkara jørð, klæddist orðið í hold beint fyri eygunum á mær!“

Latið okkum minnast til, meðan vit hátíðarhalda Jesu føðing, at mong rundan um okkum hava tað ringt og hava mist vónina. Gloymið ikki, at „orðið varð hold“, og tað merkir, at Jesus gekk hin tunga vegin at seta syndarar í frælsi, at lyfta tey falnu, at líva upp tey vónsviknu og taka sær av teimum gloymdu. Og hann segði: „Sanniliga sigi eg tykkum, so satt sum tit hava gjørt hetta móti einum av hesum minstu brøðrum mínum, tá hava tit gjørt tað móti mær.“ Matt. 25,40.

Latið okkum ikki bara halda jól fyri okkum sjálvum í ár, men eisini rætta hondina út til teirra, sum hava tað ringt og eru illa fyri. Latið okkum fara í gongd – vit fara at fáa tey bestu jólini nakrantíð.

*„...et Ord til Dagen“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Jólafjarritið

Georg Kramer, ein ungur maður, var fjarritari, og tað fell í hansara lut at hava vakt jólaaftan og jólanátt. Meðan vinmenninir kundu halda jól hjá sínari familju, sat hann einsamallur á skrivstovuni og stardi sorgarbundin fram fyri seg.

Alt lívið kom fram fyri hann henda stilla kvøldartíma. Hann sá seg sum barn í húsinum hjá gudrøknu foreldrum sínum. Hann var elstur í einum stórum barnaflokki. Her hevði hann lært at trúgva á Jesus og biðja til hansara og at leggja bæði sorgir og gleðir yvir á hann. Men tá ið hann fór heimanífrá, slepti hann øllum hesum. Í kæti og stuttleika hevði hann livað saman við líka so kátum vinum; men hann fekk ikki fjalt fyri sær sjálvum, at hann hevði ein djúpan longsul og eina óskiljandi pínu í hjartanum.

Fyri 14 døgum síðani hevði hann staðið við børuna hjá einum vinmanni, og har vórðu orð borin fram, ið vóru trongd inn í sál hansara sum eitt tvíeggjað svørð. Hann kom líka sum ikki fyri seg aftur og í kvøld var reint galið, tá ið minnini heimanífrá trokaðu seg fram.

Hann sá pápa sín fyri sær, hvussu hann tók ta heilagu bókina og las jólaevangeliið upp, og húsfólkini sungu teir kendu jólasálmarnar. Men á pannuni á pápanum hvíldi eitt skýggj. Hann hugsar um sonin – hin villfarna – tað leggur seg sum ein skuggi yvir høgtíðsgleðina.

Georg Kramer verður brádliga skræddur út úr sínum tonkum. Tað ringir, og hann fer yvir til tólið. Pappírsstrimmilin fer gjøgnum hendur hansara. Hann hvøkkur við. Eitt sovorðið fjarrit hevur hann ongantíð sæð fyrr. Hann lesur tað eina ferð afturat:

„Kæri bróðir!“ stendur har. „Verðin var glatað; men Kristus er føddur! Gleð teg, mannaætt, gleð teg bróðir og lat hesa gleði fylla hjarta títt. Tí Gud hevur lagt son sín undir lógina, so hann kundi keypa okkum leys, sum vóru undir lógini, so at vit kundu fáa barnarættin í honum. (Gal. 4,5) Hann, sum ikki visti um synd, gjørdi hann til synd okkara vegna, fyri at vit skulu verða Guds rættvísi í honum.“ (2. Kor. 5,21).



# Systir tín

Fjarritið var ikki til hansara, men var ætlað einum handilsmanni, sum æt Hammer; men tað hevði nomið hjarta hansara, og hann var ógvuliga rørdur.

Nakrir tímar ganga. Tað er aftur púra kvirt í rúminum; men Georg Kramer situr við samanløgdum hondum og við boygdum høvdi uppi yvir einari upplatnari bók, sum liggur á borðinum. Hann veit neyvan, hvar hann hevur funnið hesa bókina, ella hvussu hon er komin higar, men tað er eitt Nýggja Testamenti. Hann hevur ognað sær jólanna vælsignaða og gleðiliga boðskap: „Tykkum er í dag ein Frelsari føddur“ (Luk. 2,11), og ongantíð hevur hann sum nú sæð, at honum tørvar ein Frelsara, tí hann sær og játtar seg nú sum ein stóran syndara.

Ein tíma fyri og annan eftir situr hann og lesur jólaevangeliið umaftur og umaftur. Hann biður Gud um náði og frið vegna Jesus, Guds einborna son, sum kom til jarðar at bera frið. Tíðin er næstan farin, hann verður skjótt loystur av. Hann kvikar sær yvir til telegrafin og sendur soljóðandi fjarrit heim:

„Kæru foreldur! Í andanum haldi eg jól við tykkum í trúnni á Guds náði.“

Kæri lesari! Boðskapurin úr Himli er eisini sendur tær, so at tú kanst gleðast. Hugsa tær, sonur Guds kom til jarðar við friði! Er hetta ikki okkurt, sum kann gleða teg mitt í hesum heimi, sum er fullur av ófriði. Hann kemur at búgva í hjørtum okkara við trúnni, og hann ber frið inn í hjartað. Henda arvin gav

hann sínum fyrstu lærusveinum, áðrenn hann fór frá teimum. Hann kundi ikki geva teimum sovorðið, sum heimurin plagar at geva í arv; men hann segði:

„Frið lati eg eftir hjá tykkum, mín frið gevi eg tykkum“ (Jóh. 14,27), „og hann kom og boðaði frið fyri teimum, sum langt burtur vóru, og frið fyri teimum, sum nær vóru“ (Ef. 2,17); tí hann „íbirti frið við blóðinum á krossinum“ (Kol. 1,20). Har hann kemur inn, har verður friður.

*„Budskab fra Naadens Rige“* – *Effie Campbell* umsetti.

# Kongurin

Jesus er kongurin. Fyri føðing hansara segði ein eingil við móður hansara: „Navn hansara skalt tú kalla Jesus. Hann skal verða stórur og verða kallaður sonur hins hægsta, og Gud Harrin skal geva honum hásæti Dávids, faðirs hansara; og hann skal verða kongur yvir ætt Jákups allar ævir, og á kongadømi hansara skal eingin endi verða.“ Luk. 1,31–33.

Í kristna kirkjuliðinum hava vit lagt dent á, at Jesus bøtti fyri okkara syndir við blóði sínum. Og hetta er ein týdningarmikil sannleiki. Hetta er byrjanin í evangeliinum, gleðiboðskapinum. Men vit mugu ikki gloyma endan. Vit skulu minnast, at hann er kongur. Hann kemur aftur at seta seg í hásæti sítt í Jerusalem. Hann kallaði Jerusalem „veldisdrottins staður“, danska Bíblian sigur: „Den store konges by“.

Tað var tað, sum einaferð byrjaði í Betlehem.

*„Kirkeklokken“* – *Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**



Sunnudagsblaðið
ynskir øllum eini gleðilig jól
og Harrans signing í komandi ári



---

**SUNNUDAGSSKÚLIN**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 17. des. | **Tekstur:** | Matt. 2,1–15 + 19–23 | **Bíbliuorð:** | Luk. 2,10 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74